# Almennur fundur um autismu

**Týskvøldið kl. 19.30 verður almennur fundur í Miðlahúsinum um evnið Autisma. Evn ið er: Hava fólk við autismu tað líka so gott sum tú og eg í 2015 – og hvat gera vit meðan vit bíða? Tey, ið luttaka á fundinum verða:**

Lennart Pedersen, sálarfrøðingur og fakligur ráðgevi frá Center for Autisme í Danmark

Morten Carlsson, foreldur og formaður í Landsforeningen Autisme í Danmark

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Almanna- og Heilsumálarráðnum

Umboð frá Mentamálaráðnum og Sernámsdeplinum.

Orðstýrari er Jón Brian Hvidtfeld.

## Stutt um autismu

Eitt sindur einfalt sagt hava fólk við autismu framúr góð evni at sansa, men sera vánalig evni at fata. Tey megna ikki at "knýta kognitión til perceptión". Tað merkir, at tey sansa alt, ið hendir uttan um seg, hvørja broyting í umhvørvinum, hvønn smálut, hvørt ljóð. Samstundis eru tey ikki før fyri at skipa tað, tey sansa, í meiningsfullar heildir, ið tey kunnu fata.

Vit onnur kunnu síggja, at t.d. eitt borð er flutt, ella vit hoyra eitt ljóð, men vit skilja, hvat er hent, ella hvaðani tað man koma. Vit skilja eisini, um ljóð eru okkum óviðkomandi, eitt nú um ein bilur fer framvið, og vit geva okkum ikki far um tað. Vit duga at skilja óviðkomandi sansingar frá, tí vit fata tað, vit sansa.

Fólk við autismu fata ikki tað, tey sansa, og tey megna tí ikki at skilja óviðkomandi ljóð ella sansingar frá. Alt verður sansað við somu styrki. Alt, ið tey sansa, verður standandi sum sjálvstøðugar upplivingar, ið tey ikki megna at savna í heildir, ið tey kunnu fata. Tað er ikki torført at ímynda sær, at tilveran tá kennist ørkymlandi og kaotisk, og at tey verja seg við at byrgja seg av frá umhvørvinum.

Børn við autismu hava tí brúk fyri, at gerandisdagurin er forútsigiligur, støðugur og í friðarligum umhvørvi. Tað er ein fortreyt fyri, at børn við autismu kunnu læra. Sama hvørji onnur brek eru umframt autismu, er neyðugt at arbeiða út frá autismuni sum høvuðsbreki, um barnið skal læra nakað sum helst.

Omanfyri nevndu trý hugtøk skulu lýsast nærri:

Forútsigiligt: Av tí at børn við autismu ikki fata tað, tey sansa, eru tey tryggast, tá bert tað sama og kenda hendir teimum. Eitt nú jólastákan ella tunnusláing í skúlanum kennist ikki hugnalig, men tvørturímóti ørkymlandi, tí tað er óvanligt og óforútsigiligt.

Støðugt: Allar broytingar, eitt nú í tilhaldsstaði, starvsfólkum ella mannagongdum, eru ørkymlandi, tí børn við autismu sansa uttan at fata. Tað er tí sera umráðandi, at gerandisdagurin er so støðugur sum gjørligt, og at tær broytingar, ið kortini eru neyðugar, eru forútsigiligar. Um td svimjing er á skránni ein dag, er umráðandi, at tað ongantíð verður avlýst, uttan at børnini t.d. verða kunnað um hetta dagin fyri ella um morgunin, tá tey koma í skúla. Hevur ein lærari/starvsfólk forfall, er best at hava fastan avloysara, ið kennir børnini, so man við mynd kann vísa teimum, at í morgin fer tann ella tann at koma.

Friðarligt: Av tí at børn við autismu ikki duga at skilja óviðkomandi sansingar frá, er umráðandi at velja sær eitt friðarligt umhvørvi – og sjálvur at skapa neyðuga friðin, eitt nú við ikki at hava útvarpið standandi frá ella tilíkt.

Børn við autismu trívast best í einum skipaðum og forútsigiligum gerandisdegi, har ein veit, hvat fer at henda gjøgnum dagin. Okkara uppgáva er tí at skapa eitt umhvørvi, ið verjir tey mest møguligt móti óviðkomandi sansing og gevur teimum høvi at mennast og læra út frá teirra fortreytum – ikki okkara.

Aspergers syndrom er ein grein av autismu.




## Kundaráðgevar til avbjóðandi størv í Tórshavn

Søkt verður eftir kundaráðgevum til privatkundadeildina í Tórshavn.

Sum kundaráðgevi fært tú stórar avbjóðingar og fert at arbeiða tætt saman við hinum kundaráðgevunum.

Í starvinum sum kundaráðgevi verður dentur lagdur á heildarráðgeving og sølu, t.v.s. at ráðgivið verður um øll viðurskifti av týdningi fyri kundan, m.a. innlán, útlán, pensjón, íløgur, tryggingar og gjaldsmidling.

Uppgávurnar hjá kundaráðgevunum eru m.a.:
- ábyrgd og røkt av egnari kundaportufølju
- heildarráðgeving og søla
- kredittviðgerð
- ymiskar ad hoc-uppgávur

Vit ynskja okkum starvsfelagar, ið eru jaligir, hava góð samstarvsevni og hava hug og evni at arbeiða við kundum.

Tú dugir bæði at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi. Kundaráðgevin má hava góð evni at umstilla seg í einum broytiligum umhvørvi og kunna ganga undan.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving, Finansiel Videreuddannelse ella líknandi.

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett sambært sáttmála millum AFF og SFS.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Sæunn L. Petersen, varaleiðara, á tel. 348020 og 548020, e-mail saunn.petersen@sparikassin.fo ella Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara á tel. 348510, e-mail marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Umsókn skal vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi hósdagin tann 26. januar á middegi.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 191 fólk á 16 privatkundadeildum og tveimum vinnukundadeildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á privatkundadeildunum í Tórshavn starvast 48 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI


# Tiltøk í Miðlahúsinum í januar

miðlahúsið í Vágsbotni

**Ein røð av tiltøkum verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni í januar mánað**

### Sunnur kostur

Fríggjakvøldið 13. januar kl. 19.30 verður opið hús. Tað eru umboð fyri Herballife, sum hva tikið stig til ein almennan fund fríggjakvøld og skeið leygardag og sunnudag. Gudrun Sigfusson kostráðgevi úr Danmark heldur fyrilestur um sunnan kost og vekttap.

### Autisma

Týskvøldið 17. januar kl. 19.30 almennur pallborðsfundur verður í Miðlahúsinum við heitinum: Hava fólk við autismu tað líka so gott sum tú og eg í 2015 – og hvat gera vit meðan vit bíða?

### Ársins maður og kvinna

Fríggjadagin 20. januar kl. 16.00 verða ársins maður og kvinna kosin í Miðlahúsinum. Hetta er fyrstu ferð, at Sosialurin skipar fyri hesum tiltaki, har fólk kring landið hava havt høvi til at senda inn uppskot til besta boð uppá ársins mann og ársins kvinnu í 2005. Ein dómsnevnd velur út millum mongu uppskotini, sum eru innkomin.

### Trapputing um stjórnarskipan

Mánadagin 23. januar verður lagt fyri við fyrsta trapputinginum í ár. Hetta er eitt debatforum, har aktuell samfelagslig evni verða tikin upp til viðgerðar við luttøku av fakfólki og politikarum. Orðið er so eisini frítt.

Evnið verður stjórnarskipanin – útlit fyri tjóðskaparligari semju.

Løgmaður segði í nýggjársrøðuni, at uppskot um føroyska stjórnarskipan skal gerast liðugt í ár. Síðan skal uppskotið eftir ætlan fyri løgtingið og - sum nakað nýtt í Føroyum - til fólkaatkvøðu.

Vit seta tí spurningin: er tað neyðugt og gott fyri føroyska samfelagið at samtykkja stjórnarskipanina í staðin fyri stýrisskipanarlógina? – Og fæst í hesum døgum semja millum politisku flokkarnar um tjóðskaparligu orðingarnar?

Við á fundinum verða politisk umboð og serfrøðingar úr stjórnarskipanarnevndini (grundlógarnevndini).

### Móttøka Óli P 70

Týsdagin 24. januar verður móttøka í Miðlahúsinum. Óli P, sum hevur teknað á baksíðuni í Sosialinum síðani 1989, verður 70 ár henda dagi og er opið hús frá klokkan 15 til 17. Øll eru vælkomin.

### Manskórið konsert

Hósdagin 26. januar kl. 19.30 hevur Tórshavnar Manskór konsert í Miðlahúsinum. Nærri lýst seinni.